## Myrða neyðhjálparar

Uppreistrarmenn í Afghanistan hava myrt tríggjar kvinnuligar neyðhjálpararbeiðar-ar.Tær tríggjar kvinnurnar koyrdu í dag í bili teirra nærhendis Logar provinsini, tá Taliban uppreistrarmenn lupu á bilin, upplýsir guvernørurin í Logar, Abdullah Wardak fyri Reuters. Afganski bilførarin hjá kvinnunum misti eisini lívið undir álopinum. Tær tríggjar kvinnurnar vóru sambært AP úr USA, Kanada og Írlandi, og tær arbeiddu allar fyri International Rescue Committee, ið er ein amerikanskur hjálparfelagsskapur.

## Sótu til borðs við ofrunum

Løgreglan hevur handtikið tveir mans eftir skotdrama á einari ískafe, sum kostaði tveimum monnum og einari kvinnu lívið, meðan eitt fjóðra offur er í lívsvanda. Handtiknu menninir eru tó ikki mettir at vera drápsmenninir, men ferðast í sama umhvørvi sum teir mistonktu. Teir fýra eftirlýstu menninir sótu til borðs saman við teimum trimum monnunum. Tveir teirra doyðu úti á gøtuni tá teir royndu at flýggja, hin triði liggur á sjúkrahúsinum. Fjórða offurið var ein griksk kvinna, sum var tænari í grannakafeini. Orsøkin til skotdramaið er enn ókend.

# Klaksvíkin á pall

**Við spildurnýggjari kabaret og eini perlurøð av kendum sangum setir Klaksvíkar Sjónleikarafelag nú klaksvíkingar á pall – uppá bæði gott og ónt**

HÁTÍÐARHALD

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*



*Leikarar í Gloymdu Grýtuni undir kønari vegleiðing frá Jákupi Veyhe, leikstjóra*

Tað prutlar undir lokinum allastaðni í Klaksvík og á gomlu brandstøðini ger ein Gloymd Grýta nú vart við seg í skapi av spildurnýggju klaksvíkskabarettini, sum Klaksvíkar Sjónleikarafelag fer á pall við leygardagin.

### Søtir og beiskir bitar

Tað er ein ordans biti, Klaksvíkar Sjónleikarfelag er í ferð við at gloypa um, nú tey hava lyft lokinum á Gloymdu Grýtini, ið fjalir onki minni enn søguna um Klaksvík eini 100 ár aftur í tíðina.

Seinastu dagarnar hava tey rørt væl í grýtuni, og valt bestu bitarnar úr – summir søtir, aðrir sterkir og onkrir kanska í so beiskir fyri onkran kræsnan góma. Hinvegin, ein søga uttan bit, hevði neyvan verið ein søga um klaksvíkingar ...

- Lat okkum bara siga, at vit fara at hyggja at okkum sjálvum frá einum ósjálvshátíðarligum vinkli, sigur formaðurin í Klaksvíkar Sjónleikarafelag, Rudolf Joensen, í tí hann avdúkar, hvat tey funnu á botninum í grýtuni.

- Har lá søgan um, hvussu tað ber til, at Klaksvík eitur Klaksvík, so hon mátti sjálvandi við. Trupulleikin var bara, at søgan er uttan ljóð og litir, tí tað hendi jú fyri 100 árum síðani, sigur Rudolf Joensen við einum skálkabráði og peikar upp á pallin, har ein hópur av leikarum standa og skeldast og rópa - uttan eitt ljóð.

Sum skilst eru tað fólk úr teimum 4 ymsu hagapørtunum sum trætast um, hvør partur skal leggja navn til býin. Hví ongin fekk sín vilja, og býurin júst endaði við at eita Klaksvík, fara vit ikki at avdúka her annað enn, at tað ikki gekk stillisliga fyri seg.

### Loynilig arkiv

Frá 100 ára gomlu stummsenuni taka leikararnir áskoðararnar við upp gjøgnum eina søgliga tíðarlýsing av lívinum í Klaksvík. Alt er, sum vera man, ikki við, men sumt eigur sítt sjálvsagda pláss – ikki minst læknastríðið í 1950 unum, sum ikki bara setti Føroyar men serliga Klaksvíkina á heimskortið.

Hóast søgan er væl lýst í søgubókunum, gekk ikki so lítið fyri seg aftanfyri leiktjøldini, sum uttan iva var minst líka spennandi.

- Vit havi verið í stórt sæð øllum partisanarkivum í býnum og funnið fram



*Jákup Veyhe fær veruliga roynt seg hesar dagarnar. Her leggur hann leikararnum lag á at spæla eina 100 ára gamla stummsenu*